SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE STATSAUT. REVISORAR
TLF.(+298)11017 · FAX (+298)11018 · Á GLAÐSHEYGGI · BOX 30 · FR-110 TÓRSHAVN · SP/F. NR. 267

5160-1

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
100 Tórshavn

## Ársroknskapur 1992
(1. roknskaparár)

1344_R92.WPD

# Innihaldsyvirlit


Almennar upplýsingar ........ 3
Ársfrágreiðing ........ 4
Roknskaparátekning ........ 7
Grannskoðaraátekning ........ 7
Nýttur roknskaparháttur ........ 8
Rakstrarroknskapur fyri 1992 ........ 9
Fíggjarstøða pr. 31. desember 1992 ........ 9
Gjaldførisfrágreiðing fyri 1992 ........ 10
Notur til ársroknskapin ........ 11

# Alemennar upplýsingar

## Stýrið

Sigurð Poulsen, formaður
Kjartan Dalsgaard
Ingeborg Vinther
Jógvan Vágsheyg

## Grannskoðan

SP/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe

**Roknskapurin er góðkendur á stýrisfundi tann**

______________________________

Fundarstjórin

# Ársfrágreiðing

## Virksemi

Arbeiðsmarknaðareftirlonargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mei 1991.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Fæ grunsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum ½ prosent av teirra skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar rinda ½ prosent av útgoldnu A-inntøkunum.

Sambært lógini er ætlanin, at fyrsta útgjaldið úr grunninum verður í 1997.

Við løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993 er avgjørt, at tað av fæi grunsins, sum tann 1. apríl 1993 er yvir 2 mill. kr., verður lænt til Arbeiðsloysistryggingina.

Helvtin av láninum skuldi sambært hesum afturgjaldast 1. apríl 1995 og hin helvtin 1. apríl 1996. Við løgtingslóg nr. 21 frá 4. mars 1994 er afturgjaldsfreistin hjá Arbeiðsloysistryggingini longd við einum ári til ávikavist 1. apríl 1996 og 1. apríl 1997. Við løgtingslóg nr. 114 frá 25. november 1994 er afturgjaldsfreistin broytt soleiðis, at alt lánið skal afturgjaldast 1. apríl 1997.

Lánið til Arbeiðsloysistryggingina verður rentað við 5 % p.a. Landsstýrið veðheldur fyri hesum láni.

Við løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993 er eisini avgjørt, at inngjøld til grunnin í tíðarskeiðnum frá 1. apríl 1993 til 31. mars 1994 verða latin Arbeiðsloysistryggingini. Hesin partur skal ikki afturgjaldast av Arbeiðsloysistryggingini.

Seinni, við løgtingslóg nr. 21 frá 4. mars 1994, er avgjørt, at gjøldini til grunnin í tíðarskeiðnum frá 31. mars til 30. juni 1994 verða latin Arbeiðsloysistryggingini sum lán við eini rentu uppá 5% p.a. Hetta lán verður at gjalda aftur í seinasta lagi 1. apríl 1997. Fyri hesum láninum er ikki veitt veðhald frá landsstýrinum.

## Inntøkuviðurskifti

Inntøka grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldið - er fyri lontakarar gjørt upp sum ½ prosent av skattskyldugu inntøkuni fyri 1992 sambært fyribilsskattaskrásetingini.

At arbeiðsmarkaðareftirlonargjaldið fyri lontakarar verður gjørt upp eftir fyribilsskattaskrásetingini hevur við sær, at broytingar í skattskyldugu inntøkuni, sum koma í - í sambandi við sjálvuppgávuna og eftirfylgjandi skattaálíkning - *ikki* føra við sær tilsvarandi broyting í gjaldinum til grunnin.

Í kunngerð nr. 112 frá 20. desember 1991 um gjald til Arbeiðsmarknaðareftirlonargrunnin verður tilskilað, at gjaldið skal krevjast inn saman við fyribilsskattinum og verða endaliga uppgjørt *árið eftir* í skattauppgerðini.

Eingin slík endalig uppgerð er gjørd, annað enn grundað á fyribilsskattin.

Við øðrum orðum er møguligt, at grunnurin ikki hevur fingið ta inntøku, sum grunnurin eigur sambært lógini, um so er, at endaliga uppgerðin av skattskyldugu inntøkuni er hægri enn uppgerðin sambært fyribilsskattaskránni.

Møguleiki er sjálvsagt eisini fyri, at grunnurin hevur fingið ov nógv, um endaliga uppgerðin av skattskyldugu inntokuni er lægri enn, hvat er gjørt upp eftir fyribilsskattaskrásetingini.

Um skeivleikar eru í arbeiðsmarkanaðareftirlønargjaldinum frá løntakarum, hevur hetta við sær tilsvarandi skeivleika í uppgerðina av ágóðanum hjá grunninum mótvegis Føroya Gjaldsstovu, sum umsitur uppkrevjingina av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldinum. Føroya Gjaldsstova hevur jú avroknað til grunnin sambært uppgerð eftir fyribilsskattaskránni.

Fyri at meta um týdningin av hesi óvissu í uppgerðini av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldinum er tað goldna arbeiðsmarknaðargjaldið sambært hesum roknskapi sett upp í móti uppgerð av tí samlaðu skattskyldugu inntokuni og útgoldnum A-inntokum. Úrslitið av hesi samanbering er fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Skattskyldug inntoka í 1992 | 3.870,0 mill.kr. |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 18,5 mill.kr. |
| Svarandi til (eigur at vera 0,5%) | 0,48 % |
| Útgoldin A-inntoka í 1991 | 4.417,0 mill.kr. |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 21,7 mill.kr. |
| Svarandi til (eigur at vera 0,5%) | 0,49 % |

Munurin - t.v.s. millum 0,5% og omanfyri nevndu 0,48% og 0,49% - kann stava frá tíðarmuninum í uppgerðini av tølunum. Skattskylduga inntokan og útgoldna A-inntokan er sambært uppgerð, sum er Toll- og Skattstova Føroya hevur gjørt í 1994. Somuleiðis eru skattskyduga inntokan hjá øllum persónum tikin við í hesum tølum, meðan bert persónar undir 67 skulu rinda arbeiðsmarknaðareftirlønargjald.

Tað er sostatt sannlíkt, at grunnurin í stóran mun hevur fingið ta inntøku, sum hann eigur.

Stýrið hevur ætlanir um at fáa eina greiðari skipan til uppgerð av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldinum, soleiðis at grunnurin við vissu fær ta inntøku, sum hann eigur sambært lógini.

## Úrslit

Ársúrslitið fyri roknskaparárið 1992 kr. 38.812.761, sum stýrið mælur til, verður flutt til næsta ár.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 1992 kr. 60.497.520.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Víst verður til omanfyri nevnda um gongdina í lógargrundarlagnum fyri grunnin.

Umframt hesi viðurskifti er einki hent eftir roknskaparlok, ið kann hava serligan týdning fyri metingina av ársroknskapinum.

## Ognarviðurskifti

Grunnurin er ein sjálvegandi stovnur.

Sambært lógini fyri grunnin verður valt eitt stýri at sita fyri grunninum. Hetta stýrið, sum skal hava fýra limir og sum verður valt fyri eitt trý ára skeið, verður valt soleiðis: Ein limur umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi lontakarar, ein umboðandi Tryggingarsambandið Foroyar og stjórin í Landsbanka Føroya.

Landsstýrið tilnevnir formannin í stýrinum.

## Roknskaparátekning

Ársroknskapurin verður saman við ársfrágreiðingini við hesum góðkendur.

Tórshavn, tann

Stýrið:

Sigurð Poulsen, formaður    Kjartan Dalsgaard

Ingeborg Vinther    Jógvan Vágsheyg

## Grannskoðaraátekning

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlonargrunninum fyri 1992.

Grannskoðanin er framd samsvarandi vanligt viðurkendum grannskoðanarreglum og hevur fevnt um tey arbeiði, vit hava mett neyðug.

Fyrivarni verður tikið fyri uppgerð av inntokum grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið fyri lontakarar - og tess vegna eisini fyri uppgerð av ágóða grunsins mótvegis Foroya Gjaldsstovu. Í hesum sambandi verður víst til ársfrágreiðingina hjá stýrinum, herundir viðmerkingarnar um inntøkuviðurskifti grunsins.

Ársroknskapurin er greiddur í samsvar við roknskaparkrov í lóggávu og viðtokum og gevur, tá sæð verður burtur frá omanfyri nevnda fyrivarni, eftir okkara metan eina rættvísa mynd af felagsins ogn og skuld, fíggjarligu stoðu og úrsliti.

Tórshavn, tann 1. november 1995

SP/F Grannskoðarafelagið
Rasmussen & Weihe

Klaus Rasmussen    Sjúrður Horsdal
statsaut.revisor    cand.merc.aud.

# Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Roknskapurin er greiddur í samsvar við góðum roknskaparsiði.

Grunnurin er ikki bundin av at gera roknskap í trá við ársroknskaparlógina, men roknskapurin er gjørdur sambært meginreglunum í ársroknskaparlógini.

Hetta er fyrsta roknskaparár grunsins og sostatt eru eingin samanlíkningartol.

Nýtti roknskaparhátturin er í høvuðsheitum fylgjandi:

## Inntøkur

Inntoka grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldið - er fyri lontakarar gjort upp sum ½ prosent av skattskyldugu inntokuni fyri 1992 sambært fyribilsskattaskrásetingini.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldið gjort upp sum ½ prosent av útgoldnu A-inntokuni fyri 1992.

Av tí at hetta er fyrsta roknskaparár hjá grunninum er arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldið fyri 1991 hjá arbeiðsgevarunum inntokufort sum broyting í eginognini við ársbyrjan 1992.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til inntokuviðurskiftini í árfrágreiðingini.

## Skuldarar

Skuldarar eru virðisásettir við frádrátti av moguligum tapsvanda, grundað á eina meting av hvørjum einstokum skuldara.

## Skattur

Grunnurin hevur, vísandi til logtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinnir broytingum, ikki skattskyldu.

## Rakstrarroknskapur fyri 1992

| | Nota | 1992 |
|---|---|---|
| Nettoinntoka | 1 | 39.108.223 |
| Aðrar inntokur | | 2.859 |
| Aðrar útreiðslur | | 63.422 |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2 | 2.076.416 |
| | | 36.971.244 |
| Rentuinntokur | 3 | 1.841.517 |
| Ársúrslit | | 38.812.761 |

## Fíggjarstøða pr. 31. desember 1992

**Aktiv**

| | Nota | 1992 |
|---|---|---|
| Áogn | 4 | 26.921.379 |
| Tokur peningur | | 33.638.641 |
| Umferðarfæ í alt | | 60.560.020 |
| Aktiv í alt | | 60.560.020 |

**Passiv**

| | Nota | 1992 |
|---|---|---|
| Eginogn | 5 | 60.497.520 |
| Onnur skuld | 6 | 62.500 |
| Passiv í alt | | 60.560.020 |
| Moguligar aðrar skyldur | 7 | |

# Gjaldsforisfrágreiðing fyri 1992

| | |
|---|---:|
| Ársúrslit | 38.812.761 |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2.076.416 |
| | 40.889.177 |
| Broytingar í ogn og skuld grunsins: | |
| Áogn | -7.313.036 |
| Onnur skuld | 62.500 |
| Gjaldforisúrslit fyri 1992 | 33.638.641 |
| Gjaldforið pr. 1. januar 1992 | 0 |
| Gjaldforið pr. 31. desember 1992 | 33.638.641 |

# Notur til árrokskapin

## 1. Nettoinntøka

| | 1992 |
|---|---|
| Arbeiðsmarknaðareftirlonargjald, lontakarar | 18.576.990 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlonargjald, arbeiðsgevarar | 20.531.233 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlonargjald í alt | 39.108.223 |

Nettoinntokan - arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldið - er fyri lontakarar gjørt upp sum ½ prosent av skattskyldugu inntokuni fyri 1992 sambært fyribilsskattaskrásetingini. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldið gjort upp sum ½ prosent av útgoldnu A-inntokuni fyri 1992.

Av tí at hetta er fyrsta roknskaparár hjá grunninum er arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldið fyri 1991 arbeiðsgevarnum inntokufort sum broyting í eginognini við ársbyrjan 1992.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til inntokuviðurskiftini í árfrágreiðingini.

## 2. Avsetingar og tap uppá skuldarar

| | |
|---|---|
| Avsett móti tapi uppá skuldarar, arbeiðsgevarar | 1.379.136 |
| Avskrivað krav um arbeiðsmarknaðareftirlonargjald, arbeiðsgevarar | 624.318 |
| Avskrivað renta, arbeiðsgevarar | 72.962 |
| Tap uppá skuldarar í alt | 2.076.416 |

## 3. Rentuinntøkur

| | |
|---|---|
| Renta av arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldi, arbeiðsgevarar | 694.293 |
| Renta av innistandandi í peningastovnum | 1.147.224 |
| Rentuinntokur í alt | 1.841.517 |

## 4. Áogn

| | |
|---|---|
| Arbeiðsmarknaðareftirlonargjald fyri 1991, arbeiðsgevarar | 4.270.039 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlonargjald fyri 1992, arbeiðsgevarar | 20.531.233 |
| Føroya Gjaldsstova | 2.119.147 |
| Onnur áogn | 960 |
| Áogn í alt | 26.921.379 |

## 5. Eginogn

| | |
|---|---|
| Eginogn pr. 1. januar 1992 | 21.684.759 |
| Flutt úrslit | 38.812.761 |
| Eginogn pr. 31. december 1992 | 60.497.520 |

Eginognin pr. 1. januar 1992 stavar frá inntokuni av arbeiðsmarknaðareftirlonargjaldinum fyri 1991 frá arbeiðsgevarum.

## 6. Onnur skuld

| | |
|---|---|
| Avsett til grannskoðan, íroknað meirvirðisgjald | 62.500 |

## 7. Møguligar aðrar skyldur

Tað áliggja ikki grunninum aðrar moguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í roknskapinum.